# ÓSLÍPAÐI GIMSTEINURIN Í FRAKLANDI



Tá flestu okkara droyma um fronsku Rivieruna, ímynda vit sum oftast okkum liggjandi á sólríkum strondum, skoðandi tær róligu miðjarahavsbylgjurnar, ið blíðliga skola yvir suðurfranska meginlandið. Eisini er tað eftir hesari paradísstrond, ið tú finnur heimsins mest romantisku býir. Næststørsti býurin í Fraklandi eitur Marseilles, og hesin havnarbýur liggur eisini eftir teimum gyltu strondunum, tó at hann ikki er meinlíkur hinum býunum. Nei, ofta hevur verið tikið til, at meðan aðrir býir við dreymakendum og dragandi lyftum um glitrandi náttargongutúrar eftir Rivieruna lokka ferðafólkið til sín, kundi Marseilles við sín-um ráa lyndi ikki lagt pettið í, um ferðafólkið kom til sín ella bara gjørdi av at verða heima. Í hesari greinini fara vit at hyggja nærri at spennandi býnum, Marseilles, ella sum hann hevur verið nevndur: Fraklands óslípaði gimsteinur.

## Frá hevnandi rómverjum til landfarsótt...

2604 ára gamla søgan hjá Marseilles byrjar, tá ið grikkar bygdu býin uml. 600 f.kr við tí fyri eyga at gera ein handilsbý. Flutningur sjóvegis gjørdist hornasteinurin í handilinum í Marseilles, og mong handilsskip sigldu til og frá Marseilles. Marseilles varð vorðin ein blómandi havnarbýur, og hetta kom at seta dám á lívið og mentanina - enntá tann dag í dag.

Marseilles fekk tó ikki frið at blóma, men varð niðurbrendur av rómverjum í ár 46 f. Kr. - rómverjar endurreistu hann eisini stutt eftir. Rómverjar hava ikki verið teir einastu, ið hava gjørt seg inn á Mar-seilles, men aðrir víðagitnir menn sum Charles d'Anjou, Ludvík 14. og Adolf Hitler hava eisini hertikið og gjørt seg inn á Marseilles.

Ólukkan kemur sjáldan einsamøll - heldur ikki í Marseilles. Miðskeiðis í 18. øld herjaði sóttin og beindi fyri helvtina av býarfólkinum. Eftir hesari ræðuliga vanlukku kom býurin fyri seg aftur og stóð skjótt aftur í blóma.

Trupulleikarnir stinga seg upp aftur, tá Frakland missir síni hjálond og samstundis sín størsta handilsfelaga í Afriku eftir seinna veraldarbardaga. Marseilles kom skjótt í eina búskaparliga kreppu, ið var í hæddini í sjeytiárunum. Arbeiðsloysið var stórt og einki tamarhald var á innflytarum frá eitt nú Algeria. Lógarloysi og skøkjulevnaður vaks eisini stórt í hesum tíðarskeiði.

Av somu orsøk var ferðavinna ikki nakað, ið Marseilles gjørdi sær stórar vónir um. Ferðastovur kring heimin mældu fólki frá at fara til Marseilles í áttatiárunum og kístu tey ístaðin til hinar býirnar nærindis.

## Býarsálin

Búskaparligu kreppurnar, tær mongu mentanirnar og tað, at býurin er ein havnabýur, hevur verið við til at sett ein serstakan dám á Marseilles. Tú hevði kunnað kallað hann fyri ein kosmopolitiskan skansa við Miðjarahavið.

Tó at fransmenn leingi hava hildið lítið um Marseilles-búgvar, so er líkt til, at hesin hugburður er um at broytast - ið hvussu so er millum tey ungu í Fraklandi. Ein kanning staðfesti, at Marseilles var tann best umtókti býurin í Fraklandi - París lá á triðja plássi saman við Bordeaux.

Meðan grannabýirnir vónleyst jagstra sínar innflytarar út av landinum - við kendum politiskum oddamonnum sum Jean Marie Le Pen - so fagna Marseilles-búgvar teimum fjølbroyttu mentanunum, ið leita sær hagar. Hvør íbúgvi hevur sína serstaku ættarsøgu, ið hann við stoltleika sigur tær, um tú spyrt hann.

Tað er tað sjarmerandi sinnalagið og mentanin, ið hevur havt við sær eina framgongd innan ferðavinnuna á heili 14% síðstu trý árini. Glæsiligu ferðaskipini eru nú byrjað at leita sær til Marseilles, og ferðaskrivstovurnar hava broytt hugsan um ráa arbeiðarabýin í Golfe du Lion og eru farnar at senda ferðafólk í hópatali hagar.

Alt er líkt til, at Marseilles enn einaferð man fara at blóma.

## Zidane og hini í Marseilles

Tær ósemjur, ið hvør íbúgvi man hava sínámillum, ger fótbólturin semju við. Fótbóltsliðið í Marseilles, L'Olymique de Marseilles, er nakað, ið øll eru errin av og ganga sera høgt uppí. Sagt verður, at um liðið tapur, hvørvur sólin í nakrar dagar. Liðið hevur vunnið franska meistaraheitið tíggju ferðir og harafturat eisini vunnið UEFA-cup í 1993. Størstu dystirnir verða leiktir á risastóra Velodrome vøllinum, ið rúmar 60.000 áskoðarum. Sami vøllur, har navnframi fótbóltsleikarin Zinedine Zidane gjørdi sítt gjøgnumbrot.

Samanumtikið kann sigast, at fólkið í Marseilles er fjøl-broytt, opinskárað og bersøgið. Sum íbúgvarnir sjálvir taka til: "Tað er ikki eitt idylliskt, men eitt sensuelt, uppreistrarsinnað og kensluborið lív, ið tú livir í Marseilles, Fraklands óslípaða gimsteini".

Heilin, hjartað og sálin í Fraklandi:

# EIN LÝSING AV HØVUÐSTAÐI FRAKLANDS, PARÍS

**Høvuðsstaðurin í Fraklandi, París, liggur miðskeiðis har norðuri í landinum við Seineánna. Seine-áin býtir býin í tvey, og í ánni liggja tvær smáar oyggjar, Ile de la Cité og hin minna St. Louis.**

Upprunaliga varð París grundlagt við oynna Ile de la Cité og við vinstra áarbakkan, hóast ein føroyingur helst hevði sagt á norðara áarbakka. Men hetta sipar til rætningin, vatnið rennur, og verður henda vending dúgliga nýtt.

Í fyrstu øld e.Kr grundløgdu rómararnir París sum landspartahøvuðsstað. Sum tíðin leið, vaks býurin í rundum skapi.

Miðbýurin í París er býttur upp í 20 arrondissement. Louvre liggur í 1. arrondissement og er miðdepil í einum "spirali". Seinast í spiralinum er 20. arrondissement, og tað er hitt minst "fína". Henda býtingin speglar nøkunlunda menningina í býnum. Hvørt arrondissement hevur sína egnu lítlu stjórn við egnum býráðshúsi, posthúsi, løgreglustøð og øðrum.

Tað milda veðurlagið hevur stóra ávirkan á býarlívið. Tað ger tað møguligt at hava uttandura caféir og marknaðir umframt nógv annað.

## Fólk og tilflytan

Støðugt hevur París vaksið - bert avbrotið av kríggi og sjúkum - síðani París varð kosin høvuðsstaður í 10. øld. Í 19. øld eru alsamt fleiri fólk flutt til býin orsakað av árinunum av ídnaðarkollveltingini. París hevur leingi verið eitt friðskjól hjá teimum, sum hava flýggjað undan kríggi og forfylging úr ymsum pørtum av Europa. Tó komu fólk í stríðum streymum eftir 2. heimsbardaga og væl inn í 70-árini úr Italiu, Spaniu, Portugal og Jugoslavia eins og fyrrverandi hjálondunum Norðurafrika, Senegal, Vietnam og aðrastaðni. Henda nýggja tilflyting hevur skapt hópin av búskaparligum og sosialum mótsetningum.

## Parísiska býarmyndin

Politiska og mentanarliga støðið hjá París sæst aftur í minnisvarðum og arkitekturi. Hetta avspeglar ta longu søguna hjá býnum. Millum elstu bygningarnar telist katedralurin Notre Dame á Ile de la Cité, sum menn fóru undir at byggja í 1163.

Men kendast av øllum er sjálvandi Eiffel-tornið. Hetta tornið, sum er 320 m høgt, varð bygt í 1889 av fraklendinginum Gustave Eiffel. Upprunaliga var ætlanin, at tað bert skuldi standa eina stutta tíð, men tað var so mikið væl dámt, at tað stendur enn.

Millum nýggjastu stóru bygningar í París telist La Défense. Hesin er ein nýmótans triumfbogi; hann er fýrakantaður og sera stórur.

## La Defénse, nútímans trimumf bogin

Louvre er eitt stórsligið listasavn mitt í býnum, sum var kongshús í miðøldini. Millum annað hýsir hetta listasavnið Mona-Lisu, sum da Vinci málaði í síni tíð.

Louvre, Pompidou miðdepilin og d'Orsay savnið eru tey kendastu, men tó eru søvn í øllum støddum, sum borðreiða við alskyns áhugamálum.

## Um romantikkur hevði ein høvuðsstað...

París er uttan iva ein av vakrastu, mest romantisku og mentanarríkastu býunum í heiminum. Ein ørgrynna av søvnum eru at finna bert eitt hanagleiv frá hjartanum í býnum. Nógv listafólk, høvundar og hugsarar hava búð í 'Dreymarinnar býi' onkuntíð í lívi teirra. Teirra millum teljast Picasso, Rodin og Victor Hugo.

Nógv hava roynt at lýst vakurleikan hjá París, men øll hesi løgd saman koma ikki upp á knøini av kensluni at spáka eftir teimum steinløgdu gøtunum, teimum stórslignu boulevardunum ella fram við áarbakkunum.









